Rok á Elektron:

# Starvsfólkini kúvendu

**Starvsfólkini á Elektron hava tikið allar atfinningarnar móti leiðsluni í málinum um nýggju gjaldskipanina aftur. Antin hava tey fingið kaldar føtur, ella eru tey tvingað at kúvenda, tí alt tað, sum tey meintu 26. november, meina tey als ikki longur**

DEMENTI
*Ingi Rasmussen*




*Fýra starvsfólk á Elektron angrað tað, sum tey hava sagt um leiðsluna í einum innanhýsis brævi, sum er likið út*

»Greinin hevur skapt øsing á Elektron og hjá kundum felagsins. Hetta hevur fingið okkum at endurmeta innihaldið í skrivi okkara frá 26. november.«

Soleiðis byrja starvsfólkini á Elektron teirra fullkomiligu afturtøku av tí, sum varð grundarlagið fyri forsíðugrein á seinastu Fregnum og greinini í Sosialinum leygardagin við yvirskriftini »Gjaldskipanin er óneyðug«.

Í greinunum var víst til eitt innanhýsis skriv frá starvsfólkafelagnum í Elektron til leiðsluna. Brævið var eitt svar til tey sjónarmið, sum komu fram í heilsíðulýsingum frá peningastovnunum og Elektron.

Nú eta tey fýra starvsfólkini hvørt orð í seg aftur.

### Trekkja alt aftur

Starvsfólkini førdu annars fram, at talan var um eina ódámliga reklamuherferð til frama fyri Gjaldskipanina, og at leiðslan niðurgjørdi tær skipanir, sum eru mentar á Elektron. Tey førdu fram, at tað hevði loyst seg betur at útbygt verandi V&T-skipan enn at farið yvir til Gjaldskipanina, sum so nógv rok hevur verið um.

Nú taka tey hvørt orð í seg aftur. Í einum skrivi, sum er sent Sosialinum, verður sagt, at tey harmast um innihaldið í skrivinum, sum ikki var nóg væl umhugsað.

»Vit ásanna, at tað ikki er prógvgrund fyri teimum pástandum, sum vit førdu fram í skrivinum, og vit eru ógvuliga hørm um illgitingarnar í skrivinum«, skriva tey fýra starvsfólkini, sum hava skrivað undir.

Tey eru formaðurin og skrivarin í nevndini í starvsfólkafelagnum og tvey álitisfólkaumboð.

### Broytt meining

Líkt er til, at starvsfólkini antin hava fingið kaldar føtur, ella hava fingið beinleiðis kravboð frá leiðsluni. Tí nú meina tey als onki av tí, sum tey meintu tann 26. november.

»Aftaná enn einaferð at hava lisið opna brævið hjá peningastovnunum og Elektron frá 23. november til Føroya Løgting, hava vit onki at finnast at. Innihaldið er eftir okkara bestu sannføring rætt, og tað er sostatt ikki grundarlag fyri at siga, at nevndin og stjórnin í Elektron hava sagt ósatt«, skriva tey í brævinum.

Í brævinum ásanna starvsfólkini at enda, at tað eru leiðslan og kundarnir hjá Elektron, sum gera av, hvør skipan skal nýtast frameftir. Og tey fýra, sum hava skrivað undir, boða frá, at tey av fullum huga styðja leiðsluna í hennara stremban eftir at finna bestu loysnina í málinum og vilja virka hareftir.

### Ongin hóttan

Jørn Astrup Hansen, nevndarformaður í Elektron, vísir aftur, at leiðslan hevur kravt eina avsannan frá starvsfólkunum ella hótt tey við uppsøgn.

– Tað er mín fatan, at hasi fýra fólkini als ikki umboða starvsfólkini á Elektron. Vit hava spurt, um tey meintu brævið í fullum álvara og biðið tey umhugsa málið av nýggjum, og tey hava so sent eitt skriv út, sigur Jørn Astrup Hansen, sum ikki vil gera fleiri viðmerkingar til ítøkiliga innihaldið av brøvunum.

**Fakta**

Elektron er edv-veitari til almennar stovnar, peningastovnar, tryggingar og grunnar. Størstu parteigararnir eru Føroya Banki, Føroya Sparikassi og Føroya Landsstýri. Á P/F Elektron starvast umleið 60 fólk, og nettuumsetningurin í 2001 var umleið 46 milliónir krónur.

# Ein spurningur um at fáa fulla nyttu úr PBS

**Forstjórin í Føroya Banka og nevndarformaðurin í Elektron er troyttur av málinum um Gjaldskipanina hjá peningastovnunum og Elektron. Tað er farið púrasta av leið, heldur hann, og undrast á, hvør hevur áhugað í at steðga einum føroyskum samstarvi við PBS**

GJALDSKIPAN
*Ingi Rasmussen*



*Teir fýra føroysku peningastovnarnir rinda 3 milliónir krónur um árið fyri at vera limir í PBS, og afturfyri stendur okkum frítt at brúka nakrar skipanir, sigur Jørn Astrup Hansen.*

Føroysku peningastovnarnir eiga í Pengeinstitutternes Betalings Systemer, og tað hevði verið vitleyst ikki at fingið okkurt afturfyri.

Tað sigur Jørn Astrup Hansen, nevndarformaður í Elektron og forstjóri í Føroya Banka, sum er troyttur av nógva rokinum um eina nýggja Gjaldskipan í Føroyum.

Alt stríðið snýr seg um, hvørt føroyingar skulu sleppa tí føroysku V&T-skipanini og fara yvir til Gjaldskipanina, sum verður gjøgnumførd í samstarvi við PBS í Danmark.

– Tað, sum púra er blivið burtur í málinum, er, at vit eiga í PBS. Teir fýra føroysku peningastovnarnir rinda 3 milliónir krónur til PBS um árið fyri at vera limir, og afturfyri stendur okkum frítt at brúka nakrar skipanir. Vit fáa eisini eitt ókeypis viðlíkahald, og tað hevði annars verið ógvuliga dýrt, sigur Jørn Astrup Hansen.

Hann viðgongur, at tað var eitt tekin um frustratión, tá peningastovnarnir og Elektron sendu eina heilsíðulýsing til bløðini, har teir talaðu síni sjónarmið yvir fyri Løgtinginum og øllum føroyingum. Tað var hendan lýsing, sum fekk starvsfólk at tala at leiðsluni í einum innanhýsis skrivi. Brævið er likið út, og tí tóku starvsfólkini alt aftur longu um vikuskiftið.

Nú heldur Jørn Astrup Hansen, at málið púrasta er »blæst ud af gevind«, sum hann málber seg.

– Málið er í grundini ógvuliga einfalt. Vit hava viljað givið okkara kundum eina betri tænastu, so kundin frameftir fær eitt samlað yvirlit yvir sínar flytingar í staðin fyri tvey ella fleiri, sigur hann.

– V&T er ein einføld kreditorskipan, sum er ment til innkrevjaran. Vit vilja hava ein góða skipan, sum eisini gevur debitor ella gjaldaranum eina góða tænastu, sigur Jørn Astrup Hansen.

Gjaldskipanin kom at virka fult og heilt 1. februar. Áðrenn hendan dag var útskriftin á donskum. Nú kemur hon frá Elektron og er á føroyskum.

Gjaldskipanin stýrir teimum føstu flytingunum fyri fólk. Við skipanini fær skuldarin hvønn mánað eitt gjaldsyvirlit, ið vísir, nær og hvussu nógv kontan verður skuldskrivað komandi mánaðin, til hvønn goldið verður, og hvat verður goldið fyri.



# Túsund bilar um dagin



*Tað koyra umleið 1.000 bilar dagliga gjøgnum Vágatunnilin, nú ferðslan er við at stabilisera seg eftir fyrsta rokið sum var, tá upp varð latið*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Tað koyra 1.000 bilar gjøgnum Vágatunnilin dagliga. Men tey, sum nýta tunnilin, mugu brynja seg við toli eina tíð afturat, til gjaldskipanin endaliga er komin i rættlag. Sama er við telefon og útvarpi inni í tunlinum. Ljósini uttan fyri fara helst at lýsa í vikuni**

VÁGATUNNILIN
*Edvard Joensen*

**Vágar:** Trupulleikar eru við gjaldskipanini hjá Vágatunlinum. Kaðalbrot hevur verið, og skipanin er ikki farin at virka enn. Telefon og útvarpssignal fæst ikki í tunlinum, og ljósini uttan fyri lýsa heldur ikki.

Tað eru slíkir trupulleikar, sum skulu loysast sum skjótast, sigur Dávur Reinert Hansen, stjóri fyri Vágatunlinum.

Gjaldsskipanin kemur ikki endaliga í rættlag, fyrr enn nóg mikið av kubbum eru tøkir. Sum er, manglarí, so tey, sum hava biðið um hald, fáa ikki sínar kubbar rættiliga enn.

Sum útgangsstøði varð roknað við, at einir 400 kubbar vóru nóg mikið. Tað vísti seg kortini skjótt at vera í minna lagi, og helvtin- ella tveyhundrað - vórðu umbidnir afturat. Men tað helt heldur ikki, so nú verður roknað við einum 800-900 haldum ella so, sigur Dávur Reinert Hansen.

Nýggju kubbarnir eru umbidnir úr Noreg, og tey hjá Vágatunlinum rokna við, at teir verða framleiddir í hesi vikuni. Ein dagur, sum eitur 18. december, er nevndur, sigur stjórin fyri Vágatunlinum.

Men so er eftir at fáa teir til Føroya, og tað verður væntandi ikki fyrr enn eftir nýggjár, nú høgtíðirnar koma ímillum. So einaferð út í januar verður helst tað fyrsta, at fólk, sum standa á bíðilista, kunnu rokna við at fáa sínar kubbar.

### Nógv ferðsla

Tað hevur verið rættiliga nógv ferðsla gjøgnum Vágatunnilin, síðan hann varð latin upp týsdagin.

Nágreiniliga talið av bilum veit Dávur Reinert Hansen ikki at siga, tí eingin neyv teljing er í tunlinum. Men eftir teimum seðlum og rokningum, sum útskrivað eru við gjaldstøðina, metir hann, at einir 1.000 bilar koyra gjøgnum tunnilin um samdøgurið.

Einasta teljing, sum er á leiðini, er ferðsluteljarin hjá Landsverkfrøðinginum, sum liggur í Giljum í Sandavági. Har var lopið ógvusligt, tá tunnilin varð latin upp.

Í døgunum fimta til níggjunda december vísti tann teljarin, at har koyrdu umleið 360 bilar í meðal um dagin. Men týsdagin, tá tunnin varð latin upp, var bilatalið, sum skrásett varð í Giljum, umleið 2.455.

Nevnast skal, at teljarin í Giljum telur bara teir bilar, sum koyra eystureftir. Tað vil siga móti tunlinum. So rætta talið er helst tað dupulta.

Mikudagin, dagin eftir, at upp varð latið, var ferðslan eisini ógvuslig. Tá koyrdu einir 5.000 bilar í Giljum. Roknað báðar vegir. Dagarnar síðan hevur talið ligið beint oman fyri 1.000, sum eisini samsvarar við tað talið, leiðslan fyri Vágatunlinum hevur mett, sigur Dávur Reinert Hansen.

### Ljósini

Fólk hava undrast á, at eingi ljós eru uttan fyri tunnilin, hóast mastrar standa uppi. Í hvussu er Leynamegin. Eisini við gjaldstøðina, har fólk ganga á vegnum og útflýggja rokningar, halda ferðafólk, at tað er dekan ov myrkt.

Dávur Reinert Hansen, stjóri, sigur, at tann trupulleiki væntandi verður loystur í hesi vikuni.

Í Leynum eru elsteyrarnir uppsettir, og tað sama verður Vágamegin. Talan er mestsum bara um at seta streymin til, sigur hann.

Arbeitt hevur verið einar tvær nætur inni í tunlinum, og eisini í nátt verður tunnilin stongdur frá klokkan eitt til klokkan fimm.

Talan er um tekniskar ábøtur á einar tvær av stóru viftunum undir loftinum, sum ikki hava riggað, sum tær skuldu, sigur Dávur Reinert Hansen.

–Tá sovorðið arbeiði verður gjørt, er neyðugt at steingja heilt fyri ferðslu. Annars ber ikki til at arbeiða, sigur hann.

### Telefonstormur

Tann, sum um dagarnar ringir til skrivstovuna hjá Vágatunlinum, fær ein automatiskan telefonsvarara í hornið.

– Grundin er einfald tann, sigur stjórin, at fólk eru so ovbyrjað av arbeiði í samband við tekning av haldi og útflyggjan av kubbum, at vit hava valt at gera tað soleiðis, so hetta kann avgreiðast. Vónandi verður hetta skjótt yvirstaðið, so vit aftur kunnu veita eina góða tænastu, sigur hann.

Onkur hevur undrast á,a t tað ikki hevur borið til at goldið við kontantum beinleiðis til teirra, sum skriva rokningarnar út við gjaldstøðina.

Grundirnar eru tvær, sigur stjórin. Partvís tí, at tað bara er gjørt av, at kontantir pengar skulu ikki vera á staðnum. Og í øðrum lagi fyri at venja fólk frá byrjan at kenna skipanina, sum verður, tá alt er komið í rættlag.

At neyðugt er at skriva umsóknarblaðið, sum er at finna á heimasíðuni hjá vágatunlinum, út, heldur enn at útfylla tað elektroniskt og senda aftur, kemst av, sigur Dávur Reinert Hansen, at talan er um ein spurning um, nær ein avtala er bindandi.

– Tá fólk biða um haldið, vilja vit hava eina persónliga undriskrift. So einfalt er tað. Annars er avtalan ikki bindandi, sigur hann.

Fólk, sum hava biðið um kubbar, fáa eina váttan fyri, at umsóknin er komin, og so verður tikið av konto, so hvørt, brúkt verður. Hava fólk so eina kvittan at vísa fram á staðnum, er tað ikki verri, sigur Dávur Reinert Hansen.

GÓÐIR BRÚKTIR BILAR
Nissan Almera 2,0 Diesel GX grønur, 5 hurðar, árg. 1996. 89.000
Nissan Primera 1,6 A/C reyður, 4 hurðar, árg. 1996, 70.000 km. 125.000
Peugeot 106 Diesel gráur, 3 hurðar, árg. 1998, 60.000 km. 85.000
Peugeot 306 DT 1,9 AC bláur, 4 hurðar, árg. 1999, 61.000 km. 125.000
Peugeot 406 ST 2,0 Hdi vínreyður, 4 hurðar, árg. 1999, 120.000 km. 164.000
Opel Astra 1,7 DT brúnur, 4 hurðar, árg. 1996. 75.000
Opel Astra 2,0 DTI svartur, 5 hurðar, árg. 1999, 36.000 km. 139.000
Opel Astra 1,7 DT Van bláur, 5 hurðar, árg. 1998, 82.000 km. 78.000
Opel Astra 2,0 DT grønur, 5 hurðar, árg. 2001, 38.000 km. 175.000
Opel Vectra 1,8 svartur, 4 hurðar, árg. 1996, 80.000 km. 122.000
Opel Vectra 1,7 Diesel reyður, 4 hurðar, árg. 1995, 118.000 km. 76.000
Saab 9-3 TDI bláur, 5 hurðar, árg. 2000, 67.000 km. 208.000
Ford Escort 1,6 Van reyður, 5 hurðar, árg. 1995 65.000
Ford Escort 1,8 Diesel grønur, 4 hurðar, árg. 1995, 152.000 km. 65.000
Gevið gætur: Bilarnir á listanum kunnu verða seldir
Bilarnir finnast eisini á: www.nissan.fo
% Meinhardt Arge
v/ Oyggjarvegin • Postsmoga 3171 110 Tórshavn • Tel. 31 61 61

Lesið Sosialin

veitst tú ikki tað? Sosialurin